## Samkynd á fund við Rættarnevndina

Tá Rættarnevndin mánadagin fer at viðgera ríkislógartilmælið um broyting í revsilógini – nógv umrøddu § 266b, verður Bogi Davidsen, samkyndur føroyingur í Danmark, við á fundi.

- Eg havi gjørt av at koma heim til Føroya til fundin og havi givið boð um tað.

Hetta sigur Bogi Davidsen úr Havn, sum er lækni í Danmark. Hann er samkyndur og býr í skrásettum parlag við øðrum manni.

Í lesarabrævi í síðstu viku boðaði hann frá, at hann fegin kom á fund við Rættarnevndina, so hann kundi geva sítt íkast til viðgerðina av málinum.

Fundurin hjá Rættarnevndini verður í Løgtinginum mánamorgunin kl 10.

## Marknaðardagur

Sunnudagin 10. desember verður marknaðardagur í KÍ-høllini í Klaksvík til frama fyri ungdómsarbeiðið hjá felagnum. Har kunnu tey vitjandi ogna sær ymiskt so sum innbúgv til húsini ella ein bil. Í sambandi við marknaðardagin verða ymisk tiltøk á skránni í Café KÍ. Tað verður eisini lagaligt hjá øðrum enn klaksvíkingum at fara á marknaðardag í Klaksvík, tí tað verður ókeypis at koyra ígjøgnum Norðoyatunnilin.

# Høgni Hoydal: Føroyar eru ikki partur av danska ríkinum

**Høgni Hoydal vónar, at løgmaður nú ásannar sína ábyrgd, nú fleiri danskir politikarar eru av teirri uppfatan, at Føroyar eru samrunnin partur av danska ríkinum og at Løgtingið hevur sjálvt samtykt tað. Seinasta dømið er, at Dansk Folkeparti vil hava føroyingar í hertænastu**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

- Ætlar løgmaður at gera donskum politikarum og donsku stjórnini greitt, at Føroyar eru ikki »partur av danska ríkinum«, at føroyingar eru ikki danir, og at øll krøv um herskyldu fyri føroyingar ella onnur krøv frá danska eindarríkinum eru bygd á skeivar fortreytir, sum føroyska fólkið ongantíð hevur tikið undir við?

- Ásannar løgmaður nú, at avgerðirnar hjá sitandi samgongu um at samtykkja yvirtøkulóg, uttanríkispolitiska heimildarlóg og at gera hernaðarsamtykt, ið byggja á at staðfesta Føroyar sum samrunnan og undirskipaðan part av Danmark, vóru eitt stórt afturstig, sum nú verður brúkt beinleiðis móti føroyingum?

Hesar spurningar fer Høgni Hoydal, løgtingsmaður, at seta Jóannesi Eidesgaard, løgmanni, tá munnligir fyrispurningar verða á skránni á tingfundinum í morign.

Høgni Hoydal siugr, at ávaringarnar og mótmælini trutu ikki, tá løgmaður í 2005 í óðum verkum legði uppskot um danskar lógir fyri fyri tingið, ið staðfestu Føroyar sum ein samrunnan og undirskipaðan part av Danmark.

Hann sigur, at í viðmerkingunum til donsku lógirnar var á tíggjutals síðum sligið rimmarfast, at føroyingar vóru ikki til sum tjóð, men vóru ein partur av donsku tjóðini, og at føroyskir myndugleikar bert hava »fingið« ávísar heimildir frá donskum ríkismyndugleikum at pjøssast við síni lokalu viðurskifti.

- Longu í 2004 hevði løgmaður eisini boygt seg fyri trýsti frá donskum myndugleikum í hernaðarmálum. Løgtingið hevði í eini røð av samtyktum síðani seinna veraldarbardaga tíhildið um, at føroyingar ikki hava tikið undir við hernaðarvirksemi av nøkrum slag og at Føroyar ikki skulu nýtast til nakað hernaðarligt endamál uttan so, at Løgtingið hevur gjørt tað av, sigur Høgni Hoydal.

- Men løgmaður legði uppskot fram um nýggja hernaðarsamtykt, har alt vald varð latið upp í hendurnar á donskum myndugleikum, meðan føroyskir myndugleikar bert skulu kunnast og hoyrast, áðrenn avgerðirnar verða tiknar – t. e. at Løgtingið fær støðu sum ein almennur stovnur ella ein kommuna undirskipað einum øðrum valdi.

Høgni Hoydal sigur, at síðani hesar óviðgjørdu avgerðir, hevur danska stjórnin boðað ST frá, at føroyingar sjálvir hava valt at gerast partur av danska eindarríkinum, og tað hevur givið at bíta millum danskar politikarar og í donsku stjórnini.

Hann sigur víðari, at uttan mun til, hvat mál verður reist millum danskar politikarar í dag á Fólkatingi, har víst verður til føroyskt fullveldisstríð, so verður tað afturvíst og sligið upp í glens vísandi til, at Føroyar eru samrunnin partur av danska ríkinum og at Løgtingið hevur sjálvt samtykt tað.

- Í seinastuni eru tvey ítøkilig dømi um hesa gongd: Danski Fólkaflokkurin krevur herskyldu fyri føroyingar vísandi til, at vit »eru partar av danska ríkinum«. Og hvør skal siga tey ring fyri tað, tá tað eru boðini, ið Løgtingið hevur sent til Danmarkar, spyr Høgni Hoydal og heldur fram.

- Ein fyrrverandi ráðharri í Radikala Vinstraflokkinum, sigur í samrøðu við Dimmalætting: »Vit eru danskarar, tit eru danskarar, og tí er tað okkara skylda at hjálpa«.

Høgni Hoydal heldur, at hetta eru greflig dømi um ta kollvelting, ið er farin fram millum danskar politikarar, har allar royndir hjá fullveldisfólki at mótmæla verða kveistraðar til viks sum umboðandi »ein minniluta« mótvegis samtyktunum hjá samgonguni.

Tí vónar Høgni Hoydal, at løgmaður nú ásannar sína ábyrgd fyri hesi ófrættakendu gongd og mótmælir hart og týðiliga – og ger greitt, at føroyska fólkið ongantíð hevur tikið undir við hesum skeivu avgerðum løgtingsins.



*Høgni Hoydal, formaður Tjóðveldisfloksins vónar, at løgmaður nú ásannar sína ábyrgd, nú danskir politikarar ferð eftir ferð trínar fram og tosa um Føroyar sum samrunnan part av danska ríkinum*


*Søren Espersen, fólkatingsmaður fyri Danska Fólkaflokkin vil hava føroyingar og grønlendingar í hertænastu*

## Føroyingar skulu hava herskyldu

**Danski Fólkaflokkurin sigur, at føroyingar og grønlendingar skulu hava herskyldu á jøvnum føti við danir**

POLITIKKUR
*Árni Joensen*
*arni@sosialurin.fo*

Kravið um, at føroyingar og grønlendingar skulu hava somu herskyldu sum danir, kemur á borðið, tá grønlendska sjálvsstýrisnevndin fer at hava fund í januar. Millum nevndarlimirnar er fólkatingsmaðurin Søren Espersen úr Danska Fólkaflokkinum, og hann fer at leggja kravið fram tá.

Tað sigur Danski Fólkaflokkurin í tíðindaskrivi seinnapartin í gjár.

Søren Espersen sigur, at tað er ikki annað enn rímiligt at føroyingar og grønlendingar fáa skyldur aftur fyri tey rættindi, sum teir hava sum sjálvstøðugir partar av ríkisfelagsskapinum.

- Og í hesum viðfangi er herskyldan ein náttúrligur partur, heldur hann.

# Reint vatn til bygdarfólkið


*Kvívíkingar fáa um stutta tíð aftur drekkivatn úr nýggjum reinsiverki*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Kvívíkar bygdaráð samtykti á fundi í gjárkvøldið at byggja vatnreinsiverk í bygdini**

VATN
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Kvívík:** Hagastýrið fyri Ognarhagan hevði frammanundan samtykt at selja kommununi økið, og hevur Heilsufrøðiliga Starvsstovan haraftrat tilmælt ætlanini.

Kostnaðurin fyri vatnreinsiverkið, sum verkfrøðingurin Martin E. Leo hevur prosjekterað, er mettur til 1,3 mió. kr.

- Peningur er játtaður til byggingina, sigur Boje Christensen, borgarstjóri í Kvívík.